UTTAN ÚR HEIMI

## Seks ár afturat

Forsetin í Finnlandi eitur framvegis Tarja Halonen. Á seinna valumfari sunnudagin fekk hon 51,8 prosent av atkvøðunum, meðan hitti valevnið, tann borgarligi Sauli Ninistö, fekk 48,2 prosent.

Valið gjørdist meiri spennandi, enn tey flestu høvdu væntað, tí í fyrra umfarinum var Tarja Halonen langt framman fyri Sauli Nisistö. Politiskir eygleiðarar í Helsingfors siga, at avbjóðarin fekk nógvar veljarar afturat teir seinastu dagarnar upp undir seinna valumfarið, meðan forsetin fekk atkvøðurnar frá teimum, sum longu framman undan høvdu avgjørt at stuðla henni.

Tarja Halonen varð fyrru ferð vald til forseta í 2000. Tá vann hon longu í fyrra valumfari, men sigurin var líka tepur sum hesaferð. Tá fekk Halonen 51,6 prosent, meðan hitt valevnið, Esko Aho, fekk 48,4. Meiningakanningar tey seinastu árini hava tó víst, at onkuntíð hava umleið 60 prosent av finsku veljarunum sagt seg vera til reiðar at styðja forsetan.

## Vánaligir vegir forða fyri vali

Nú eru 14 ár, síðani fólk í Angola vóru á vali, og sambært forsetanum ber tað ikki til at skipa fyri vali, tí vegasambandið er so vánaligt.

José Eduardo dos Santos, forseti, segði í einari røðu fyri stjórnarflokkinum MPLA, at tað er alneyðugt at bøta um vegasambandið og jarnbreytarkervið, áðrenn val kann haldast, og tí sleppa angolar ikki á val fyrr enn í fyrsta lagi næsta ár, segði hann. Forsetin duldi tó ikki fyri, at betri vega- og jarnbreytarsamband fer at koma flokkinum til góðar, tá val eina ferð verður. At valið verður næsta ár er ikki í samsvari við tað, sum forsetin fyrr hevur sagt, tí hann hevur leingi lovað fólkinum val í ár, skrivar AP úr Luanda.

Valið í 1992 er tað einasta, sum hevur verið í Angola. Tað vann MPLA, men stutt eftir valið brast borgarakríggj á, tí andstøðuflokkurin UNITA við Jonas Savimbi á odda vildi ikki viðurkenna valúrslitið. Savimbi doyði fyri góðum trium árum síðani, og tá samdust partarnir um at binda frið.

## Kaldur januar

Tað hevur verið rættiliga kalt í Danmark tann seinasta mánaðin, og sambært veðurstovuni í Keypmannahavn hevur januar ikki verið so kaldur í mong ár.

Meðalhitin síðani á nýggjárinum hevur verið 1,2 kuldastig, og tað er umleið eitt stig kaldari enn vanligt og samstundis tann kaldasti januar síðani 1996, tá meðalhitin var 1,8 kuldastig. Men januar hevur verið munandi kaldari onkuntíð fyrr. Í 1987 vóru í meðal 4,7 kuldastig í januar. Kaldasti januarmánaði, sum danir vita um, var í 1942. Tá vóru í meðal 6,7 kuldastig.

Mátingarnar hjá donsku veðurstovuni vísa týðiliga, at januar er vorðin munandi lýggjari tey seinnu árini. Frá 1976 til 2005 var januar í meðal 0,8 hitastig, og árini frá 1986 til 2005 var meðalhitin í januar 1,5 stig. Januar í ár er tískil eitt undantak.

## 20 ár síðani Challenger

Sunnudagin vóru 20 ár, síðani amerikanska rúmdarferjan "Challenger" sprongdist, beint eftir at hon var farin á flog av Cape Canaveral í Florida. Øll tey sjey rúmdarfólkini doyðu.

Í tí sambandi varð skipað fyri einum minningarhaldi í Cape Canaveral sunudagin, har leiðslan í NASA og avvarðandi hjá manningini á "Challenger" luttóku. Bill Gerstenmeier frá NASA og Richard Scobee, ið er sonur skiparan á rúmdarferjuni, løgdu kransar við ein minnisvarða, sum er reistur til minnis um manningarnar á "Challenger" og "Columbia" og tríggjar rúmdarmenn, sum doyðu undir einari roynd í 1967. "Columbia" sprongdist í 2003, tá hon var á veg aftur á Jørðina.

Øll tey tólv børnini hjá manningini á "Challenger" vóru hjástødd, tá ferjan fór upp frá tann 29. januar í 1986. 73 sekund seinni sprongdist hon.

# Danmark í brennideplinum



*Illir palestinar á Vestara Áarbakka settu eld á danska flaggið*

*Mynd: Reuters*

**Danskar vørur eru tiknar úr handlunum í Miðeystri, Dannebrog verður brent, sendiharrar verða boðsendir at koma heim, og norðurlendingar fáa boð um at fara til hús. Í Danmark verður mælt til at boykotta handlar, sum muslimar eiga**

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tær nógv umrøddu Muhammedstekningarnar hjá Jyllandspostinum eru vorðnar ein kleppur fyri Danmark og danir. Í Saudiarabia og fleiri øðrum londum í Miðeystri hava handlarnir tikið allar danskar vørur av hyllunum, tað sama hava apotekini gjørt við danskan heilivág, og danskir sølumenn eru álopnir á gøtuni. Í Irak verða kristnar kirkjur brendar og bumbaðar. Saudiarabia hevur tikið sín sendiharra úr Keypmannahavn, og Libya hevur stongt sína sendistovu har. Onnur lond sum Sýrialand, Jordan og Kuwait hava tikið líknandi stig.

Á Vestara Áarbakka løgdu illir palestinar Dannebrog niður á vegin or traðkaðu á tað, áðrenn teir settu eld á. Í Gaza-geiranum kravdu teir víðgongdu bólkarnir Islamskt Jihad og al-Aqsa Brigadurnar, at allir danir, sviar og norðmenn skulu fara haðani innan tvey ella trý samdøgur. Tað gjørdi, at danska uttanríkisráðið kendi seg noytt til at biðja danir í Miðeystri ansa sær.

### Vantandi kunnleiki

Muslimarnir eru illir, tí Jyllandsposturin hevur háðað Muhammed profet við at avmynda hann sum yvirgangsmann við einari bumbu á høvdinum ella við svørði í hond. Sambært muslimsku læruni skal profeturin als ikki lýsast við tekningum, og tí verða tekningarnar hjá danska blaðnum mettar at ein háðan av muslimsku trúnni og øllum muslimum. Jyllandsposturin hevur sýtt fyri at biðja um umbering, tað vil danska stjórnin heldur ikki gera, og tí er muslimska vreiðin vend ímóti Danmark og dønum.

Flestu danir styðja Jyllandspostin og avgjørdu støðuna hjá stjórnini, sum skjóta seg inn undir danska pressufrælsið. Tí kom tað illa við, tá danski sendiharrin í Saudiarabia, Hans Klingenberg, segði sína hugsan í samrøðu við amerikonsku tíðindastovuna AP um vikuskiftið.

– Eftir mínum tykki hevur Jyllandsposturin framt eit mistak orsakað av vantandi kunnleika um islamsku trúnna, segði sendiharrin. Orðini fullu ikki í góða jørð í Keypmannahavn, og talsmaðurin hjá Vinstra kvikaði sær at gera vart við, at sendiharrin var farin út um mark.

### Milliardir í vanda

Millum donsku fyritøkurnar, sum nú verða boykottaðar í Miðeystri, eru Arla, Danfoss, Lego, Novo Nordisk og B&O. Arla, sum árliga selir mjólkarúrdráttir fyri fleiri milliardir krónur til lond í Miðeystri, er serliga meint rakt. Kunningarstjórin, Astrid Gade Nielsen, segði í gjár, at í løtuni kostar boykottið fyritøkuni einar 10 milliónir krónur um dagin, og at fyritøkan er útistongd á stórt sæð øllum marknaðinum í Miðeystri.

Stendur boykottið við, fer tað eisini at kosta arbeiðspláss í Danmark, tí summi virki hjá Arla gera bara vørur til marknaðin í Miðeystri. Í einari roynd at sissa fólk hevur Arla havt stórar lýsingar í saudiarabiskum bløðum, men til fánýtis.

Samstundis eru kreftir í Danmark farnir at mæla dønum til at boykotta handlar og kioskir, sum muslimar eiga. Danska útvarpið segði í gjár, at teir seinastu dagarnar hava nógvir danir fingið sms-boð við áheitan um at gevast at keypa í hesum handlum og kioskum.